# – Vit fara ikki at undirbjóða tryggingar

*Tað kemur ikki upp á tal, at Trygd fer at undirbjóða sjóvátryggingar, sigur Páll Kunoy, sum er farin frá Tryggingarfelagnum Føroyar til Trygd at verða deildarstjóri fyri sjóvátrygging felagsins*

EIRIKUR LINDENSKOV

– Mær dámar væl avbjóðingar. Nú eg havi verið í starvi hjá Tryggingarfelagnum Føroyar í 15 ár - harav 11 sum deildarstjóri á Sjóvátrygging - helt eg, at tíðin var komin til at royna okkurt annað.

Hetta sigur 58 ára gamli Páll Kunoy í Havn, sum 1. oktober tekur við sum deildarstjóri á sjóvátryggingardeildini hjá kappingarneytanum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, Trygd.

Páll Kunoy er útbúgvin skipsførari, men gavst tíðliga at sigla. Hann sigldi eitt skifti við Mærsk og seinni við Skipafelagnum Føroyar. Í 1968 fór hann at starvast á skrivstovuni hjá Skipafelagnum Føroyar, og í 1970 fór hann í starv á Fiskasøluni. Síðani 1985 hevur hann starvast á Tryggingarsambandinum Føroyar, sum seinni skifti navn til Tryggingarfelagið Føroyar.

Tá Marius Thomasen, stjóri, doyði í 1988, gjørdist Jens Petur Arge forstjóri í tryggingarfelagnum, og Páll Kunoy tók við eftir hann sum deildarstjóri á Sjóvátrygging 1. apríl 1989.

**Ruddaði á Kongabrúnni í gjár**

Páll Kunoy byrjar í nýggja starvinum 1. oktober. Men longu í gjár mátti hann rudda skrivstovu sína á Kongabrúnni, tí tá hann gav leiðsluni boðini um nýggja starv sítt, varð hann biðin um at pakka saman umgangandi og fara til hús. Hetta var hann sjálvandi greiður um, tí hann fer beinleiðis yvir til »fíggingdan«.

– Tað er sjálvandi við sorgblídni at eg siga gamla arbeiðsplássi mínum farvæl, men forrætning er forrætning, sigur hann og leggur afturat, at maður kemur í mans stað.

**Brúk fyri tveimum tryggingum**

Páll Kunoy heldur, at tað fer at gagna vinnulívinum, at kapping nú eisini verður á sjóvátryggingarøkinum.

– Tað er heilt vist, at vit hava brúk fyri tveimum tryggingarfeløgum, sigur Páll Kunoy. Hann sær eisini stórar avbjóðingar fyri framman - ikki minst, nú oljuleitingarvirksemi byrjar.

– Oljuaktivini skulu tryggjast í sjóvátrygging. Alt, sum skal flytast um føroyskan bryggjukant, skal eisini tryggjast Føroyum, og um olja verður funnin, so skal framleiðslan eisini tryggjast í her, sigur Páll Kunoy.

**Sjóvátrygging størsta part av eginognini**

Tryggingarfelagið Føroyar hevði við árslok eina eginogn upp á 1,1 milliard. Av hesum stóð sjóvátryggingin fyri 770 milliónum. Hetta sigur nakað um, hvussu stórur partur av samlaða tryggingarkapitalinum kemur úr vinnuni á sjónum, vísir Páll Kunoy á.

– Tá eg byrjaði á Sjóvatrygging í 1985 var eginognin 124 milliónir. Nú er hon vaksin upp á 770 milliónir. Hetta sigur nakað um tann vøkstur, sum hevur verið í hesi vinnu seinastu 15 árini, sigur hann.

Um orsøkirnar til, at tað er fallið honum í lut at seta á stovn sjóvátrygging hjá Trygd sigur Páll Kunoy, at hann sjálvandi hevur nógva vitan um sjóvátrygging eftir at hava arbeitt í so nógv ár - bæði í sjóvinnuni og í tryggingarvinnuni.

– Eg veit, hvat slíkar tryggingar kosta, sigur Páll Kunoy, og vissar um, at tey, ið tryggja á sjónum, ikki fara at verða eins skuffað, og føroysku bilaeigararnir eru vorðnir í hesum døgum.

– Nei, tað kemur ikki upp á tal, at vit fara undir slíkt undirbjóðingarvirksemi, vissar nýggi sjóvátryggingarstjórin um.

– Tað er sunt við kapping - men við skili, sigur hann.




*Christian C. Nielsen, stjóri í Trygd ynskir Pálli Kunoy vælkomnum í starvið sum deildarstjóri fyri sjóvátryggingini hjá Trygd*

Mynd: Álvur Haraldsen

## Neyðugt við navni

*Fyri at sleppa undan óhepnum eyknevnum er neyðugt at geva býarpørtum og økjum navn, sigur Finnur Johansen, fyrrverandi býráðslimur í Havn*

EIRIKUR LINDENSKOV

Í blaðnum í gjár skjeyt Poul Mohr upp at nevna nýggja havnarlagið uttan fyri molan fyri Skansabryggjan. Hetta tí, at bryggjan liggur á Skansaboðunum. Hann var troyttur av at hoyra havnarfólk nevna hetta »Nyhavn« - og ikki minst at lesa hetta á prenti.

Eisini Finnur Johansen, fyrrverandi býráðslimur í Havn, er samdur við Poul Mohr.

– Eg havi fyri mongum árum síðani heitt á býarmyndugleikarnar um at geva hasum havnarlagnum eitt navn - tí tað er einasti máti at sleppa undan, at tað fær eitt eyknevni, so sum Nyhavn, sigur Finnur Johansen.

Hann vísir á ymsu minni hepnu heitini, sum býarpartar í Havn hava fingið, so sum Kardomummubýur, Snophill, Peterhead o. s. fr.

– Um býarpartar og øki fáa nøvn beinanvegin slepst undan slíkum, sigur Finnur Johansen, sum sjálvur hevur skotið upp at nevna nýggja havnarlagið Skansaboða.

– Men navnið Skansabryggjan er eisini gott, sigur hann, og vónar, at fólk og myndugleikar kunnu taka nýggja navnið til sín.

## Roykivirkið í Klaksvík skift eigarar



*Nýggir eigarar hava nú tikið yvir Roykivirkið í Klaksvík*

EIRIKUR LINDENSKOV

Roykivirkið í Klaksvík hevur skift eigarar. P/F Grønanes Vestmanna, P/F JFK Klaksvík og Eyðbjørn Poulsen, Klaksvík, hava keypt Sp/F Klaksvík Fish Company, sum vanliga verður kallað Roykivirkið.

Felagið er keypt frá Julius Johannesen, Kaj Johannesen og Jóhonnu Johannesen. Felagið skiftir navn og eitur nú Pure Water.

Julius Johannesen er farin frá sum stjóri og takkar øllum viðskiftafólki fyri gott samstarv og ynskir nýggju eigarunum góða eydnu framyvir. Eyðbjørn Poulsen er í hesum sambandi settur sum stjóri.

Á virkinum verður í dag gjørt nógv burtur úr laksinum og virkið kemur framyvir at arbeiða við verandi virksemi og harafturat eru ætlanir um at víðka virksemi, so at arbeitt verður við fleiri fiskavørum.

Í dag arbeiða 45 fólk á virkinum.




